# Ætla at gera skjótt av við miðnámsskúlanum

**Mentananarnevndin hjá Løgtinginum ætlar at avgreiða málið um miðnámsskúlan longu til týsdagin**

SKÚLADEPIL Í SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Mentanarnevndin hjá Løgtinginum ætlar at bera skjótt at fyri at avgreiða málið um skúladepil í Suðuroy.

Tað sigur Andreas Petersen, formaður í mentanarnevndini.

Men tað er eisini neyðugt, skal tað eydnast at avgreiða málið í hesi tingsetuni, tí næsta fríggjadag fer Løgtingið í summarfrí og kemur ikki saman aftur, fyrrenn nýggja tingárið byrjar á ólavsøku.



*– Vit skulu vera lidnir til týsdagin, sigur Andreas Petersen*

Eftir ætlan skuldi mentanarnevndin longu hava sín fyrsta fund um málið longu í gjár, mikudagin.

Tá skuldi nevndin kalla landsstýrismannin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni á fund við nevndina.

Tá skuldi nevndin eisini gera av, hvør annar skuldi kallast á fund við nevndina, áðrenn hon kann avgreiða málið.

Helst skuldi so fundur vera aftur í morgin, fríggjadagin.

### Skal vera liðugt týsdagin

Andreas Petersen sigur, at málið skal fyri aftur tingið týsdagin, skal tað eydnast at avgreiða tað áðrenn tingið fer til húsar.

Skal dømast eftir tí, sum varð sagt í tinginum, tá ið málið var til 1. viðgerð týsdagin, er lítil ivi um, at tað verður samtykt, hendir ikki okkurt heilt óvæntað.

Tjóðveldisflokkurin og miðflokkurin vóru ímóti, men tað var alkunnugt frammanundan.

Hinvegin taka allir samgonguflokkarnir undir við tí.

Tað var bara ein tingmaður ú samgonguni, sum mutaði ímóti og tað var javnaðarmaðurin, Sverri Midjord.

### Skúladepil í Hovi

Í staðin fyri ætlaða miðnámsskúlan í Vági, ætlar landsstýrið at byggja ein skúladepil í Hovi við studentaskúla og heilsuskúla.

### Skúlarnir skulu vera lidnir í 2008.

Landsstýrið sigur, at tað er bíligari at byggja báðar skúlarnar saman, eins og tað gevur ávísar fyrimunir í rakstrinum.

Hesum tekur formaðurin í mentanarnevndini undir við.

– Tað kemur ikki uppá tal at byggja tveir skúlar, tá ið báðir skúlarnir kunnu byggjast saman, sigur Andreas Petersen.

– Hann sigur, at verður ein skúladepil bygdur í Hovi, eru eisini møguleikar fyri at leggja aðrar útbúgvingar afturat skúlanum seinni, bæði útbúgvingar, sum eru kendar nú og útbúgvingar sum taka seg upp í framtíðini.

– Samstundis tekur hann undir við tankanum um eitt ellisheim í Vági, men hann leggur dent á, at tað er eitt stig, sum kommunurnar mugu taka.

– Barnatalið í Suðuroy er minkað nógv og tað er tekin um eitt samfelag í kreppu. Tí er tað umráðandi at royna at venda gongdini og tað kann gerast við at skapa arbeiðspláss, ikki minst arbeiðspláss til konufólk, sigur Andreas Petersen.

# Yvir 2000 fólk á stevnu fyrsta dagin

**Longu fyrsta dagin tann stóra fiskivinnustevnan í Havn var opin, vóru yvir 2000 fólk og vitjaðu**

FISH FAIR 05
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

*Danjal Pauli Hansen er sera væl nøgdur við fiskivinnustevnuna higartil*



Teir, sum fyrireika stóru fiskivinnustevnuna á Sandvíkahjalla norðanfyri Havnina eru vælnøgdir við undirtøkuna tann fyrsta dagin.

Dánjal Petur Hansen, sum er ein av fyrireikarunum, sigur upplatingardagin týsdagin vóru yvir 2000 á stevnu.

Tað er hann rættiliga væl nøgdir við.

Hann sigur, at vanliga plaga fleiri fólk at vera á stevnuni teir báðar seinnu dagarnar og hann væntar tískil at heilt nógv fólk verður tann seinasta stevnudagin, hósdagin, sum eisini er frídagur.

Tað kostar 150 krónur at fara á fiskivinnustevnuna.

Hann sigur eisini frá framsýnarum, at teir lata væl at umstøðunum.

Stevnan verður hesuferð hildin í eini stórari høll á Sandvíkahjalla.

Hinar ferðirnar hevur hon verið hildin í einum tjaldi inni í Runavík.

– Tað skerst ikki burtur, at umstøðurnar eru nógvar ferðir betri í eini høll, enn tær eru í einum tjaldi.

Hann ásannar eisini, at alt talar fyri, at tað er í Havn, at stevnan fer atvera hildin framyvir.

– Havnin er rætta staðið til stevnur sum hesar, men tað er ikki bara tí at umstøðurnar eru góðar til sjalva stevnuna.

Men tað eru eisini umstøðurnar uttanfyri sjálvt stevnuøkið, sum eru betri í Havnini enn tær eru í Runavík.

– Framsýnarar vilja hava hotell og matstovurnar so tætt við stevnuøkið sum gjørligt og tær treytirnar lýkur Havnin.

Hann sigur ein týðandi partur av virkseminum á eini slíkari stevnu, er, at framsýnarar bjóða viðskiftafólkum á matstovur og til ymisk tiltøk, so tað skerst ikki burtur at til tað eru umstøðurnar í Havn betri enn í Eysturoy.

Kortini heldur hann at ta er ikki nóg mikið av rúmi á hotellunum í høvuðsstaðnum til stór tiltøk sum hesi og tí kemur tað ómetaliga væl við, at nógv privatfólk eisini hava viljað hýst stevnufólki.

Hetta heldur hann er ein støða, sum vit mugu góðtaka, tí tað kann ikki krevjast, at vit skulu hava hotelkømur til so stór tiltøk sum hesi, tí tað er so sjáldan at tey eru.

# Fýra bjóða seg fram at gera Hovstunnilin

**Nú Landsverk arbeiðir við at fyrireika arbeiðið at gera Hovstunnilin, hava fýra byggifelag bjóða seg fram at gera arbeiðið**

HOVSTUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú arbeiðið at gera Hovstunnilin skal bjóðast út, fer valið at standa ímillum fýra byggifeløg.

Tað er greitt, at eftir at Landsverk hevur bjóðað fyritøkum tip prekvalifisering, sum tað nevnist á fakmáli.

Tað er, at landsverk hevur bjóðað fyritøkum, sum halda seg vera førar fyri at gera arbeiðið um at bjóða seg fram.

Og tað vóru fýra byggifeløg, sum bjóðaðu seg fram.

Talan er um trý feløg við føroyskum áhugamálum og eitt íslendskt felag burturav. Tey fýra feløgini eru:

1) NCC í samstarvi við Byggitek

2) LNS í samstarvi við Articon

3) MTH í samstarvi við J&K Petersen

4) Ístak, sum er eitt íslendskt felag.

Upplýsingarnar um feløgini verða nú gjøgnumgingin og so skal avgerast, hvørji feløg verða boðin at bjóða uppá arbeiðið at gera Hovstunnilin, sigur Landsverk.

Vinnumálaráðið hevur fingið heimild til at brúka upptil 150 milliónir til tunnilin.

Talan er um eina verkætlan uppá tilsamans 4.677 metrar av tunli og vegum.

Sjálvur tunnilin verður 2.437 metrar langur. Men Øravíkarmegin skulu 1.790 metrar av vegi dagførast og gerast av nýggjum og Hovsmegin skulu 450 metrar av vegi gerast av nýggjum.

Øravíkarmegin verður innslagið í Tjaldarvíksbrekkum og Hovsmegin undir hamarinum við Torvsheygg, sum er einar 200 metrar í ein útnyrðing, har landsvegurin fer um Hovsá.

Tunnilin verður 9,5 metrar breiður í neðra og vegurin í honum verður 7 metrar breiður. Vegirnir til tunnilin vera 7 metrar breiðir við 1,25 m breiðari vegøksl á hvørjari síðu.

Arbeiðið at gera tunnil og vegir skal bjóðast út. Bjarni Djurholm sigur, at ætlanin er at útbjóðingartilfarið skal vera liðugt mitt í apríl og fyrst í september skal tað verða klárt at byrja upp á sjálvan tunnilin.

Á fíggjarlógini í ár eru 31 milliónir krónur settar av til endamálið. Tað stóra takið verður næsta ár, tá ið tað verður neyðugt at seta 75 milliónir krónur av til arbeiðið, men so verður aftur neyðugt at seta 44 milliónir av í 2007.

Løgtingið fer at viðgera málið í næstum.